VÁGA KOMMUNA

# Gerðabók

## Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 22.10.2024 kl. 18:00 |
| **Fundarstaður:** | |
| **Málnr.:** | 21/00003 |
| Til staðar: | Bjarni Prior, Albert Ellefsen, Rósa Samuelsen, Jónhard Selfoss, Tórdis Dam Johannesen, Ásla Leila Johansen, Sólfríð Jacobsen, Jóanis Albert Nielsen |
| Varalimir: | Martin Simonsen, Oddmar Ravnsfjall |
| Ikki til staðar: | Jens Gaardlykke |
| Aðrir partar: | |
| Fundarskrivari: | Fía Selma Nielsen |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til kunningar** | | | |
| 9/24 | 24/00045-14 | Mál beind í nevnd 9-24 | 3 |
| 10/24 | 24/00447-4 | Uppskot um seta hámarksferðina niður í í bygdum øki | 4 |
| **Til støðutakan** | | | |
| 61/24 | 24/00405-6 | Umsókn um marknaumskipan til ummælis - matr.nr.369a og 417a | 5 |
| 62/24 | 24/00415-2 | Umsókn um sundurbýti av matr.208p í Miðvági | 6 |
| 63/24 | 24/00306-3 | Umsókn um byggiloyvi til sethús á matr.nr 91q í Sandavági | 7 |
| 64/24 | 24/00403-3 | Djóraverndarfelagið - Umsókn um Matrikul til internat | 8 |
| 65/24 | 24/00414-3 | Innrætting av gamlaskúla til Barnaverndartænastuna | 9 |

VÁGA KOMMUNA


| | | | |
|---|---|---|---|
| 66/24 | 24/00436-2 | Uppskot til Kommunustýrisskipan 2024 | 10 |
| 67/24 | 24/00445-1 | Eykaætlan 4 2024 | 11 |
| 68/24 | 22/00696-2 | Barna- og ungdómspolitikkur fyri Vága kommunu | 12 |
| 69/24 | 24/00443-2 | Marknaumskipan millum matr.nr 109a og 108b í Sandavági | 14 |
| | | | |


Formansváttan:_____________

VÁGA KOMMUNA

**Til kunningar**

## 9/24 Mál beind í nevnd 9-24

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 22.10.2024 | 9/24 |

**Málslýsing:**

**Býráðið 22. oktober 2024:**

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 10/24 Uppskot um seta hámarksferðina niður í í bygdum øki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 22.10.2024 | 10/24 |

**Málslýsing:**

Borgarstjórin hevur kannað møguleikan fyri at seta hámarksferðina niður ígjøgnum bygt øki í Vága Kommunu. Upprit verður lagt fram sum kunning til býráðið.

**Býráðið 22. oktober 2024:**

Býráðið ynskir at borgarstjórin arbeiðir víðari við møguleikanum.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

Til støðutakan

## 61/24 Umsókn um marknaumskipan til ummælis - matr.nr.369a og 417a

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 10.10.2024 | 63/24 |
| 2 Býráðið | 22.10.2024 | 61/24 |

**Málslýsing:**

Marknaumskipanin umfatar at matr.nr.417a í Vatnsoyrum letur 1365 m2 til matr.nr.396a í Vatnsoyrum og matr.nr.396a letur 1249 m2 til matr.nr.417a.

Sambært samskiftinum partanna millum, er semja um umbýtið og at partarnir finna útav hvussu munurin verður avroknaður.

Fyrisitingin viðmælir marknaumskiftið.

**Tekniska nevnd 10. oktober 2024:**

Viðmælt

**Býráðið 22. oktober 2024:**

Samtykt.

Formansváttan:

VÁGA KOMMUNA

# 62/24 Umsókn um sundurbýti av matr.208p í Miðvági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 10.10.2024 | 64/24 |
| 2 Býráðið | 22.10.2024 | 62/24 |

## Málslýsing:

Umhvørvisstovan hevur sent Vága kommunu umsókn um sundurbýti av matr.nr 208p Miðvági til ummælis. Søkt er um at býta uml. 5000m² frá 208p, til ein nýggjan matrikkul

## Tekniska nevnd 10. oktober 2024:

Viðmælt

## Býráðið 22. oktober 2024:

Samtykt.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

# 63/24 Umsókn um byggiloyvi til sethús á matr.nr 91q í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.09.2024 | 58/24 |
| 2 Býráðið | 25.09.2024 | 53/24 |
| 3 Tekniska nevnd | 10.10.2024 | 67/24 |
| 4 Býráðið | 22.10.2024 | 63/24 |

**Málslýsing:**

Eigararnir av matr.nr 91q í Sandavági, hava søkt um byggiloyvi til sethús omaná verandi grund, sum er gjørd á matr.nr 91q í Sandavági

**Tekniska nevnd 12. september 2024:**

Ein meiriluti Jóanis Albert Nielsen, Dagbjørn Hansen og Tórdis Dam Johannesen mæla til at geva byggiloyvi til sethúsini, mælt verður frá at geva lætta, at gera bilhús nærri vegnum enn byggisamtyktin loyvir.
Ein minniluti Sólfríð Jacobsen og Jónhard Selfoss mæla til at geva byggiloyvi til sethúsini og at geva lætta at byggja bilhús nærri vegi enn 3 metrar.

**Býráðið 25. september 2024:**

Samtykt at taka málið av skrá.

**Tekniska nevnd 10. oktober 2024:**

Mælt verður til, at geva lætta at byggja bilhús nærri vegi enn 3 metrar.

**Býráðið 22. oktober 2024:**

Samtykt.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 64/24 Djóraverndarfelagið - Umsókn um Matrikul til internat

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 10.10.2024 | 62/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.10.2024 | 62/24 |
| 3 Býráðið | 22.10.2024 | 64/24 |

**Málslýsing:**

DVF søkir um ein matrikul í Vága kommunu, stødd á leið 3000 m2 til teirra núverandi og framtíðar virksemi.

Fyrisitngin hevur einki viðmæli. Víst verður á økið kring Ríðihøllina.

**Tekniska nevnd 10. oktober 2024:**

Mælt verður til, at vísa á økið kring ríðihøllina, sum DVF kann leiga.

**Fíggjarnevndin 16. oktober 2024:**
Viðmælt.

**Býráðið 22. oktober 2024:**

Samtykt.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 65/24 Innrætting av gamlaskúla til Barnaverndartænastuna

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 07.10.2024 | 59/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.10.2024 | 64/24 |
| 3 Býráðið | 22.10.2024 | 65/24 |

**Málslýsing:**

Barnaverndartænastan hevur í einatíð sóknast eftir hóskandi hølum til teirra virksemi, tí verandi hølir ikki verða mett egnaði longur. Borgarstjórin hevur saman við leiðaranum fyri barnaverndartænastuna arbeitt við ymiskum loysnum, út frá viðlagda uppskoti til innrætting av gamlaskúla í Miðvági metir Barnaverndartænastan, at hølini hóska væl til teirra virksemi.

Mentanar- og trivnaðarnevndin verður biðin um at taka støðu til, um gamliskúli í Miðvági skal nýtast til Barnaverndartænastuna, sambært viðlagda uppskoti til innrætting.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 07. oktober 2024:**

Rósa Samuelsen og Tórdis Dam Johannesen taka undir við uppskotinum. Ásla Leila Johansen og Jónhard Selfoss taka ikki undir við uppskotinum.

**Fíggjarnevndin 16. oktober 2024:**

Viðmælt. Ein meirluti: Borgarstjórin, Albert Ellefsen og Tórdis Dam Johannesen viðmæla at málið verður lagt fyri býráðið. Ein minniluti: Jónhard Selfoss og Ásla Leila Birgirsdóttir Johansen mæla frá.

**Býráðið 22. oktober 2024:**

Samtykt. Ein meirluti: Borgarstjórin, Jóanis Albert Nielsen, Albert Ellefsen, Tórdis Dam Johannesen, Rósa Samuelsen, Oddmar Ravnsfjall, Ásla Leila Birgirsdóttir Johansen, Sólfríð Jacobsen og Martin Simonsen eru fyri.
Ein minniluti: Jónhard Selfoss er ímóti.

Formansváttan:__________

VÁGA KOMMUNA

## 66/24 Uppskot til Kommunustýrisskipan 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 10.10.2024 | 21/24 |
| 2 Býráðið | 22.10.2024 | 66/24 |

**Málslýsing:**

Borgarstjórin og formaðurin í vinnu- og havnanevndini leggja fram uppskot til broyting í kommunustýrisskipanini fyri Vága kommunu. Broytingin snýr seg í høvuðsheitum um at avtaka vinnu- og havnanevndina. Mett verður ikki, at talið av málum, ið vinnu- og havnanevndin viðgerð eru nóg nógv, til at ein nevnd burturav skal arbeiða við teimum. Tí verður mælt til at leggja uppgávurnar hjá vinnu- og havnanevndini til teknisku nevnd at umsita.

**Vinnu- og havnanevndin 10. oktober 2024:**

Vinnu- og havnanevndin mælir til, at taka undir við uppskotinum.

**Býráðið 22. oktober 2024:**

Viðmælt.

Formansváttan:_____________

VÁGA KOMMUNA

# 67/24 Eykaætlan 4 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.10.2024 | 68/24 |
| 2 Býráðið | 22.10.2024 | 67/24 |

**Málslýsing:**

1. Viðgerð av eykaætlan 04 2024

| | |
|---|---|
| § 1 Kommunal fyrisiting | 410.000 |
| § 2 Løga (Heilsudepilin) | -1.000.000 |
| § 3 Børn og ung | 1.418.000 |
| § 3 Løga (Sóljugarður) | 500.000 |
| § 4 Undirvísing | 30.000 |
| § 4 Løga (Skúlin á Giljanesi) | -1.500.000 |
| § 6 Teknisk mál | 850.000 |
| § 6 Løga (Kirkjug. og søla av grundstk.) | -2.000.000 |
| § 7 Kommunal virki | 50.000 |
| § 20 Stuðul til rentuútreiðslur | 600.000 |
| § 20 Veiðigjald | -250.000 |
| § 20 Tøkugjald | -500.000 |
| § 20 Felagsskattur | -2.000.000 |
| | |
| Rakstrar, løgu og útlánsúrslit (RLÚ) | -3.392.000 |

**Fíggjarnevndin 16. oktober 2024:**

Viðmælt.

**Býráðið 22. oktober 2024:**

Samtykt.

Formansváttan:__________

VÁGA KOMMUNA

## 68/24 Barna- og ungdómspolitikkur fyri Vága kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 06.02.2023 | 3/23 |
| 2 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 06.03.2023 | 6/23 |
| 3 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 13.04.2023 | 27/23 |
| 4 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 13.06.2024 | 31/24 |
| 5 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 16.09.2024 | 44/24 |
| 6 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 07.10.2024 | 61/24 |
| 7 Býráðið | 22.10.2024 | 68/24 |

**Málslýsing:**

Sum partur av álitinum um børn og ung í Vága kommunu, var eitt tilmæli at orða ein barna- og ungdómspolitikk fyri Vága kommunu. Ein arbeiðsbólkur, saman settur við umboðum úr barna- og ungdómsøkinum og mentanar- og trivnaðarnevndini hevur gjørt eitt uppskot til orðing av einum barna- og ungdómspolitikki.

Mentanar- og trivnaðarnevndin verður biðin um at koma við viðmerkingum til uppskotið.

10.06.2024: Barna- og ungdómspolitikkurin er rættlisin og settur upp grafiskt. Nevndin verður biðin um at taka støðu til uppskotið.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 06. februar 2023:**

Málið verður tikið upp aftur á næsta fundi.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 06. marts 2023:**

Málið verður tikið av skrá, og arbeitt verður víðari við málinum á øðrum fundi.

Formansváttan:__________

VÁGA KOMMUNA

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 13. april 2023:**

Viðmerkingar frá nevndini til barna- og ungdómspolitikkin verða skrivðaðar inn og verður politikkurin síðani sendur til rættlestur, og verður politikkurin so lagdur fyri á fundi aftur.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 13. juni 2024:**

Mælt verður til at kalla ungdómsráðið inn at viðgerða politikkin.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 16. september 2024:**

Samtykt at beina barna- og ungdómspolitikkin aftur í umsitingina at arbeiða víðari við saman við ungdómsráðnum.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 07. oktober 2024:**

Mælt verður til at taka undir við barna- og ungdómspolitikkinum.

**Býráðið 22. oktober 2024:**

Samtykt at málið verður beint aftur í mentunar- og trivnaðarnevndina.

Formansváttan:__________________

## 69/24 Marknaumskipan millum matr.nr 109a og 108b í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 22.10.2024 | 69/24 |

## MARKNAUMSKIPAN MILLUM MATR.NR 109A OG 108B Í SANDAVÁGI

Umhvørvisstovan hevur sent kommununi umsókn um marknaumskipan millum matr.nr 108a og 108b í Sandavági til ummælis.

Talan er um, at býta neyst frá sethúsum og at leggja neyst saman vid matr.nr 108b í Sandavági

**Býráðið 22. oktober 2024:**

Samtykt.

Formansváttan:

VÁGA KOMMUNA

Fundurin lokin kl. 19:14

Bjarni Prior

Albert Ellefsen

Martin Simonsen

Rósa Samuelsen

Jónhard Selfoss

Tórdis Dam Johannesen

Ásla Leila Johansen

Sølfríð Jacobsen

Jóanis Albert Nielsen

Oddmar Ravnsfjall

Formansváttan:__________